UTTAN ÚR HEIMI

## Norska krónan ikki so sterk

Norski fíggjarmálaráðharrin, Per-Kristian Foss, vil vera við, at virðið á norsku krónuni er yvirmett.

Norska vinnulívið hevur leingi kært seg um viknandi kappingarføri við umheimin, tí virðið á norsku krónuni er so stórt. Vinnulívið hevur víst á, at hetta hevur kostað ein hóp av arbeiðsplássum, og at nógvar fyritøkur eru farnar av knóranum av somu orsøk. Men nú ætlar stjórnin at greiða umheiminum og norðmonnum sjálvum frá, at krónan er ikki so nógv verd, sum fólk halda.

- Fleiri seta virðið á krónuni í samband við, at vit nýta meiri størri part av oljuinntøkunum til samfelagið, og tað hevur havt við sær, at virðið á krónuni er størri, enn tað í veruleikanum átti at verið, sigur Per-Kristian Foss. Hann vísir á, at sjálvt um stjórnin ætlar at økja nýtsluna úr oljugrunninum millum 20 og 25 milliardir krónur hetta til 2010, er tað avmarkað, hvussu stóra ávirkan tað fær á norska búskapin.

## Valdu svensk flogfør

Eftir at hava umhugsað eitt svenskt og eitt amerikanskt tilboð hevur stjórnin í Kekkia gjørt av at leiga fjúrtan jagaraflogfør av svenska slagnum Gripen til landsins loftverju.

Svenska flogfarið vann kappingina við tað amerikanska F-16, sjálvt um amerikanska stjórnin royndi at leggja trýst á kekkar fyri at fáa teir at velja tað amerikanska flogfarið. So seint sum fyri einari viku síðani var amerikanski handilsmálaráðharrin, Donald Evans, í Prag í somu ørindum, men til fánýtis.

Kekkar skulu hava tvey svensku flogførini í 2005, og tey koma ístaðin fyri tey sovjetsku MIG-flogførini, sum eru farin at eldast. Frammanundan hava Ungarn og Suðurafrika fingið sær Gripen-flogfør. Kekkiskir flogskiparar og teknikarar fara í næstum til Svøríkis at útbúgva seg, skrivar svenska tíðindastovan TT.

## Dýrt at byggja í Noregi

Húsa- og íbúðarprísirnir í Noregi eru tær hægstu í Skandinavia. Orsøkin er, at ognarskatturin í Noregi er nógv lægri enn í hinum londunum, samstundis sum norska lønin er hægri enn í Danmark og Svøríki.

Hetta kemur fram í einari nýggjari kanning. Har sæst, at tað kostar umleið 13.500 norskar krónur fyri hvønn fermetur at byggja eini sethús í Noregi í dag. Í Danmark er prísurin 9.000 norskar krónur fyri fermeturin og í Svøríki 8.000 krónur.

Búskaparfrøðingurin Steinar Juel sigur við norska útvarpið, at tann sjáldsama lága rentan í Noregi kann hava við sær, at húsaprísurin fer uppaftur longri upp. Hann sigur, at hava fólk ta uppfatan, at rentan verður verandi so lág sum nú, er tað ikki óhugsandi, at húsa- og íbúðarprísurin fer at hækka millum 25 og 40 prosent teir næstu tólv mánaðarnar. Eisini norska byggivinnan væntar, at tann lága rentan fer at seta ferð á húsabyggingina.

## Cleese upp í politikk

Nú Arnold Schwarzenegger hevur prógvað, at tað ber væl til hjá einum kendum filmsleikara at koma sær framat í politikki, umhugsar kendi skemtarin og filmsleikarin John Cleese at gera tað sama.

Sambært vinmanninum Michael Palin umhugsar Cleese at stilla upp til borgarstjóravalið í býnum Santa Barbara í amerikanska statinum Kalifornia, har Arnold Schwarzenegger sum kunnugt er guvernørur. Við blaðið Daily Telegraph sigur Palin, at John Cleese er sera hugtikin av tí politiska lívinum í Santa Barbara, og at hann umhugsar at royna at gerast borgarstjóri.

So er bara at vóna, at John Cleese fer at stýra býnum betur, enn Basil Fawlty stýrdi tí væl kenda gistingarhúsinum.

# Lindh-morðið liðugt kannað



Anna Lindh varð myrd í einum handilshúsum í Stockholm tann 10. september

Mynd: Reuters

**1.000 síður við 6.000 skjølum skulu sannføra rættin um, at tann 25 ára gamli skuldsetti maðurin myrdi svenska uttanríkisráðharran, Onnu Lindh, tann 10. september**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Líka síðani hann varð tikin, hevur tann skuldsetti avsannað, at tað var hann, sum stakk Onnu Lindh so meint, at hon doyði morgunin eftir. Løgreglan sigur seg harafturímóti vera sannførda um, at hon hevur tikið tann rætta mannin.

Í gjár var løgreglan liðug við kanningarnar, og tá fekk verjin hjá tí skuldsetta tær 1.000 síðurnar við umleið 6.000 skjølum, sum sambært løgregluni eru nóg mikið til at sannføra rættin í Stockholm um, at tann 25 ára gamli maðurin er drápsmaðurin. Verjin sleppur nú at kanna ákæruritið og skjølini. Roknað verður við, at maðurin verður formliga ákærdur tann 16. januar, og at málið kemur fyri í rættinum fýra dagar seinni.

Leif Jennekvist, sum hevur staðið fyri kanningunum hjá løgregluni, sigur við Aftenposten, at arbeiðið hevur tikið drúgva tíð, tí løgreglan hevur tikið sær ta tíðina, sum var neyðug. Men tað rúgvusmikla próvtilfarið hevur gjørt, at vit hava ongantíð verið í iva, sigur hann.

Hann viðgongur, at løgreglan hevur verið serliga umhugsin, tí síðani morðið hava heimsins eygu verið vend ímóti Svøríki, sigur hann. Øll hava hugsað um Palme-morðið, sigur Leif Jennekvist.

# Saddam hevði njósnarar í Svøríki

**Minst seks svenskir ríkisborgarar av irakskum uppruna hava í fleiri ár njósnast í Svøríki fyri Saddam Hussein. Fleiri túsund fólk vórðu kannað og skrásett**

SADDAM HUSSEIN
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Upplýsingarnar eru úr skjølum hjá iraksku fregnartænastuni, og sum eru komin undan kavi í Bagdad í seinastuni.

Sambært svenska útvarpinum, sum hevur sæð skjølini, høvdu irakar minst seks njósnarar í Svøríki. Uppgáva teirra var at halda eygað við fleiri túsund svenskum ríkisborgarum av assýriskum uppruna. Hildið verður, at hesi eru umleið 60.000 í tali. Assýrarnir vóru upprunafólkið í gamla Mesopotamia, sum er ein stórur partur av tí núverandi Irak. Saddam Hussein viðurkendi ongantíð assýrararnar sum eitt serstakt fólk, og helt teir nógvu assýrararnar í Svøríki vera eina hóttan.

Í skjølunum hjá iraksku fregnartænastuni sæst, at njósnararnir hjá Saddam Hussein vóru sera nágreiniligir, tá teir skrásettu upplýsingar um assýrararnar í Svøríki. Har sæst, hvar fólk arbeiða, hvat tey gera í frítíðini, hvørja politiska áskoðan tey hava, hvørjum klæðum tey ganga í, og hvussu tey annars eru í gerandisdegnum.

Tað sæst eisini, at irakska fregnartænastan hevði fólk á røttu støðunum. Eitt nú hevur ein teirra arbeitt á skrivstovuni, sum tekur sær av útlendskum ríkisborgarum, sum flyta til Svøríkis. Á tann hátt sá hann skjøl um allar irakar, sum leitaðu sær friðskjól har.



# M’as Blues Band takkar fyri seg



*Emma Vágoy – heimsstjørna í Føroyum – hevur rættuliga rúnarbundið allar føroyingar við sínum sermerkta tónleikastíli*

**Fríggjadagin er síðsti møguleiki at hoyra Emmu og hennara Blues Band. Hetta er í samband við eitt tiltak, ið verður í handlinum hjá Valdemar Lützen úti á Skálatrøð millum kl 16 – 18**

M’AS

Nú verður sett punktum fyri einum sera hendingaríkum ári, har fløgu, blaðútgáva er fingin frá hondini og ikki minst, ein stór skúlakonsertferð. Tá framførðslan er liðug, kunnu tey í M"as Blues Band hyggja aftur á 92 spælingar í ár! Tað má verða nærum met, hjá einum áhugabólki.

*Nú hava tit spælt nógv, hvussu hevur Emma tað nú?*

– Eg havi tað gott, eg verið ongantíð troytt av at syngja. Einasta, eg eri kedd um, er at eg gjørdist sjúk herfyri, tá slapp eg ikki út at syngja, tí eg misti røddina. Eg veit, at nógv hava verið kedd av at vit ikki spældu, men ein poppstjørna uttan rødd má liggja í songini, sigur Emma Vágoy.

*Hvussu gongur við søluni av fløguni?*

– Eg havi verið og snakka við Høgna og ein drong og eina gentu, ið arbeiða í 3’arinum.Tey siga, at næstan túsund fløgur eru seldar men tað er ikki nokk. Guitarleikarin hjá okkum Demmus Hansen sigur, vit mugu selja tveytúsund, um eg skal verða berømt, og tað vil eg, tí tað er stuttligt. Um vit ikki selja nógvar fløgur, so kunnu vit ikki spæla fleiri inn, tí tað kostar nógvar pengar.

*Hvat gleðir tú teg til nú?*

– Vit skulu spæla fríggjadagin har niðri bátarnar liggja, har fara vit at geva øllum plakatir og jólakort av okkum. Vit fara eisini at selja fløguna og so skal eg skriva autografar. So verður ikki meira spælt. Annars gleði eg meg til jólini, fáa karamellir, nógvan góðan mat og ís omaná. Mær dámar væl at ganga á bingo, síðst vann eg.

*Hevur tú nøkur ynskir?*

– Eg vóni, at øll fara at fáa tað gott, tey sum eru sjúk verða frísk, tey sum saknað onkran, fáa troyst. Ikki minst, so vóni eg at nógv fólk fara at keypa fløguna hjá mær »Hetta er eisini mítt land II«, tí tað er deiligt at verða berømt. Eg vil ynskja øllum eini gleðilig Jól og eitt gott nýggjár.

Ikki sæst á Emmu Vágoy, at hon hevur verið í »luftini« meginpartin av árinum, nú hon og sjeykurin Olfert fara omaneftir Áarvegnum. Hon við plastikposanum, har sangtekstirnar og eggin hjá Olfert liggja í, nú skal síðsta spæling fáast frá hondini og so er friður, keðiligt!









